# BØNARLØTAN

APRÍL 2021 36. árg.

## *1. Skírhósdagur* *Orðt. 1.1-33*





**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 16, Victoria 14, Emma Grace 13,**
**Jónatan 11, Markus 9, Evita 6, Joy 4**

Vit gleðast um, at nøkur eru lýðin og verða doypt. Biðið fyri Jose Luis, Gabriel og Javis, sum taka ábyrgd í samkomuni. Biðið eisini, at vit megna at hjálpa teimum, sum koma til okkara við ótta, iva og trupulleikum.

## ZAREPTA

Legur byrja nú aftur samsvarandi vegleiðing frá myndugleikunum. Biðið, at allar legur verða vardar móti koronu. Sí www.zarepta.fo! Familjulegan fyri fólk við breki verður skipað sum dagslega frá kl. 11 til 19 dýrabiðidag 30. apríl og leygardagin 1. mai við avmarkaðum tali hvønn dagin. Tilmelding frá 15. apríl á brek@zarepta.fo

## KRINGVARPIÐ

| | |
|---|---|
| 4. apríl | Útvarpsmøti, Ebenezer, Tórshavn |
| 11. apríl | Sjónvarpsandakt, Beinta Áargarð |
| 18. apríl | Sjónvarpsandakt, Beinta Áargarð |
| 25. apríl | Sjónvarpsandakt, Júst í Túni Vang |

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Langi fríggjadagur* — *Róm. 3.1-31*



### USA, Alabama, NTM
### Judy og Óli á Grømma Jacobsen

Páskamorgun og 18. apríl skal eg tala heimanífrá á Zoom í brøðrasamkomu, vit ofta vitja í Kuala Lumpur í Malaisia. 20. apríl liggur leiðin til Kentucky og Missouri at vitja samkomur og hitta lærarar á venjingarskúlanum hjá NTM umframt at vitja vinir, sum regluliga biðja fyri okkum. Har vitja vit eisini Kathy og Páll Hansen. Tað er altíð hugnaligt at fáa eina løtu saman við føroyingum. Vit eru koppsett tvær ferðir.

## *3. Leygardagur* *Róm. 4.1-25*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit gleðast um at kunna hava møtir á páskum. Fyri ári síðan kundu vit ikki savnast. Biðið, at nógv koma at hoyra um Harran, og at tey hava opin hjørtu at taka ímóti honum.

## *4. Páskadagur* *Job 41.1-25*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Kristus er upprisin – ja, sanniliga er hann upprisin! Mátti hetta verið dýrabart fyri okkum, nú vit hátíðarhalda páskir eins og systrar og brøður okkara kring heimin.

## *5. Annar páskadagur* *Job 42.1-17*



**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

Ivasamt er, um vit fáa loyvi at koma til Grønlands í summar orsakað av koronu, men ferðaætlan verður løgd at fara uml. 25. mai. Um ikki tá, so táið loyvi fæst. Útkikstunnan í mastrini, sum hevur eyðkent Juvel II, er tikin niður. Skipið verður sandblást, málað og umvælt í Skagen.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 13, Svend 12, Terji 8, Petra 7**

## *6. Týsdagur* *Róm. 5.1-21*

**FØROYAR, ATLANTIC MISSION**

Biðið, at vit – eftir vilja Guds – fáa møguleika at nýta Juvel II í evangeliskari tænastu í apríl - mai í Danmark ella í Føroyum.

**FØROYAR**

**Birgit og Svenning av Lofti**



Eftir at hava havt tvey vikuskiftismøti á Eiði seinasta heyst verður nú aftur skipað fyri vikuskiftismøtum í Hólmahúsinum í vár. Fyrst 27.-28. mars og síðani 17.-18. apríl. Takk fyri forbøn.

## *7. Mikudagur* *Róm. 6.1-23*

**DANMARK, Kristnastova**

**Dora og Niels Pauli Nónstein**

**Sigrid 13, Andreas 11, Kristina 10**

**Sólva og Jákup Hansen**

**Susan og Øssur Berghamar**







Møtini halda á sunnumorgun kl. 11. Okkum tørvar vísdóm at brúka økta frælsið rætt, nú Danmark spakuliga letur uppaftur. Andaktir verða sendar á www.stream.fo annaðhvørt hóskvøld. Okkum leingist eisini eftir, at dyrnar til sjúklingatænastuna lata upp, og at samfelagið og hirðatænastan fáa rúmari ræsur.

## *8. Hósdagur* *Orðt. 2.1-22*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 16, Trisha 9, Emma 4**

Biðið, at lýggja várluftin kemur skjótt í ár, so vit aftur kunnu savnast sum samkoma. Vit vóna eisini at kunna hava dóp í vár ella í summar.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen,**
**Josva 11, Ester 10, Samuel 6**

⋆ Í dag fyllir Ryan Hansen 12 ár

## *9. Fríggjadagur* *1. Krønb. 9.1-23*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit halda á at endurskoða Rómbrævið og rætta í Ápostlasøguni. 12. apríl byrji eg at undirvísa í málskeiði á netinum. Næmingarnir og aðrir lærarar eru staddir í Evropa. Eg eri seks tímar aftan fyri tey, sum merkir, at undirvísingin er um morgunin hjá mær og seinnapartin hjá teimum.



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam 17, Noah 14, Lydia 4**

## *10. Leygardagur* *1. Krønb. 9.24-44*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Umit, felagsskapur fyri turkar, eggjar turkiskum trúgvandi at arbeiða sum trúboðarar. Lærisveinavenjingin hjá Umit hevur higartil fingið góða undirtøku. Umit stimbrar luttakandi at náa út og taka meiri ábyrgd. Tey virka eisini saman við bíbliubrævaskeiðnum við uppfylging. Biðið, at nóg nógv taka sær av uppgávunum, og at mong melda seg til undirvísing. Ramadan, muslimski føstumánaðurin, byrjar 13. apríl. Tá hava tey kristnu serligar avbjóðingar. Av koronu verður onki outreach 23. apríl á Princess Island.

## *11. Sunnudagur* *Róm. 7.1-25*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit eru takksom fyri góða heilsu henda veturin og fyri ta hjálp, Anna regluliga fær frá heilsuverkinum. Dubby hevur tí betri stundir til aðra tænastu. Hann hevur gjørt fleiri podcast við heitinum „Facing Death with Joyful Hope“. Honum tørvar hjálp at miðla podkastini og at gera fleiri. Vit leggja eisini fleiri sangir afturat á okkara youtuberás, m.a. ein nýggjan sang um dóp, og eisini umsetingar av føroyskum sangum og Skriftirnar í sangi. Augustin og Moussa halda á at luta Orð Guds á útvarpsrás og á Facebook hvørja viku.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**

## *12. Mánadagur* *Sálm. 40.1-18*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**
Ein deyvur maður, sum kom til trúgv gjøgnum møtir og samtalur á alnótini, varð doyptur herfyri. Vónandi lata samkomurnar meira upp eftir páskir. Í apríl hevur felagsskapurin hjá bíbliutýðarum fyri deyv fund á Zoom. Umstøðurnar eru torførar, og teimum tørvar fíggjarliga hjálp. Takk fyri forbøn fyri okkum!

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



## *13. Týsdagur* *Markus 15.1-23*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Grønland væntast at lata upp aftur fyri flogferðslu 18. apríl. Um Gud vil, vóna vit at hava fýra legur í summar og byrja 6. juli. Biðið, at Harrin sendir leiðarar og arbeiðsfólk. Eisini handverkarar og arbeiðsmenn at arbeiða í mai/juni at gera umklæðingarhúsið, fótbóltsvøllin og spæliplássið liðugt til legurnar eins og fáa Juvel á sjógvin og gjøgum høvuðssýn. Hin makedoniski maðurin í Áps. 16.9 er nú grønlendari, stendur í Kommune Kujaleq og sigur: „Kom yvir til Qaqortoq og hjálp okkum!“

## *14. Mikudagur* *Markus 15.24-47*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð**

Biðið, at Harrin sendir starvsfólk til legurnar og arbeiðsfólk at byggja uppíbygning til vaski- og goymslurúm; kunning: Thorvald Gaardlykke 519191. Familjulega verður 27. juni - 3. juli og síðan tvær barnalegur og ein ungdómslega. Tørvur er á eini 10 - 15 fólkum til hvørja legu, tvs. liðleiðarum, sangarum, tónleikarum og fólki til matgerð og vask. Hesi kunnu vera einstøk, í bólki ella familjur við børnum. Vit hjálpa fegin við øllum spurningum viðv. ferðaseðlum og uppihaldi her í Nuuk. Ferðastuðul kann eisini partvíst fáast. Kunning: Ragnhild í Skorini Jacobsen, +299 486448.

## *15. Hósdagur* *Markus 16.1-20*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit takka øllum, ið biðja fyri okkum, og sum stuðla okkum fíggjarliga; tað heldur tænastuni í gongd – Harrin løni tykkum, 2. Tess. 2, 16-17! Biðið fyri máltíðunum, vit ætla at hava fyri fólki, ið koma til bíbliutímar hjá okkum, og fyri øðrum, ið eru einslig. Vit takka Harranum, at skrúvurnar aftur eru settar í Qaamaneq, og at aðrar umvælingar verða gjørdar.

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 10, Tabita 7, Debora 5, Natan 2**

## *16. Fríggjadagur* *Róm. 8.1-17*




**OM, SUÐURAFRIKA**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

Bønarsvar! Eg havi fingið nýtt uppihaldsloyvi í tvey ár og gleði meg at halda á í verkinum millum børn og ung í Mamelodi.

**FØROYAR**
- **Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 13**
- **Unn og Jógvan Zachariassen**
- **Lis Zachariassen**
- **Annika og Poul Færø**
- **Maria og Jens Bech**



## *17. Leygardagur* *Róm. 8.18-39*



**ÍRLAND,**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Nú hava samkomur, skúlar og handlar verið afturlatin í nærum eitt ár. Guðrun er farin aftur til arbeiðis, nú skúlar lata upp. Ivor og samkomuleiðslan leggja ætlanir fyri komandi tíðina. Timmy er liðugur við 3. lestrarárið og fyrireikar starvsvenjing. Karina søkir inn á hægri lærustovn. Gud er góður, hann byggir samkomu sína.

**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**



## *18. Sunnudagur* *1. Krønb. 10.1-14*

**SVEIS, Nyon, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 7, Micah 7**

Vit gleðast um at hava funnið hóskandi samkomuhøli, men enn mugu vit yvirtala myndugleikarnar at lata okkum nýta tey til samkomuendamál. Biðið, at vit kunnu hittast aftur til møtir henda mánaðin. Heilsan hjá Jeanette er nógv batnað.

## *19. Mánadagur* *1. Krønb. 11.1-21*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**
**(fj.arb. í North Cotes)**

Vit hava frætt frá samkomuni í Wakomo, at tey hava tað gott andaliga. Biðið fyri teimum og minnist somuleiðis tey trúgvandi í Sorimi og Sobai. Koronusmittan er nú vaksandi í Papua Ný Guinea. Støðan við koronu í Onglandi er batnað, og næmingarnir kunnu nú aftur savnast í flokshølunum. Carol hjálpir til á missiónsdeildini. Eg umseti brotið í Rómbrævinum, sum ikki bleiv liðugt, tá fyrra týðingin varð prentað.

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 3, Timon 1**

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 9**

**USA, Nebraska, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Rachel og Peter Hansen**

## 20. Týsdagur — 1. Krønb. 11.22-47



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 12, Noah 11, Karis 7,**
**Judah 5, Ethan 3**

Biðið, at Mengen-samkoman verður sameind í kærleika, og at leiðararnir taka trúarstig, sum kveikja onnur og samkomuna. Biðið, at samverkafamilja kemur at hjálpa og um trygg flogviðurskifti. Takkið, at vit fáa tveir hjálparar úr Týsklandi at heimaskúla børnini komandi ár. Takk fyri allan stuðul og bøn.



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 4, Jude 2, Evelyn 0**

## 21. Mikudagur — Róm. 9.1-33



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 10, Leah Ève 7, Abigail 2**

Um Gud vil, planta vit nýggja samkomu í sept. Cecile skipar fyri bønarløtum um morgunin hvønn týsdag, mikudag og hósdag á Zoom. Vit hava nógv ung, sum vilja lata seg doypa. Vit hava nógv at gera. Biðið, at Gud gevur okkum vísdóm bæði at røkja familju og samkomu.

## *22. Hósdagur* *Orðt. 3.1-35*



### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen
### Kano 11, Nana 9, Louie 7, Rio 1

Shino heldur á at hava bíbliutímar við trimum kvinnum, sum ongantíð áður hava hildið á eini bíbliu. Ein lesur nú í bíbliuni hvønn dag, og hinar eru eisini ágrýtnar at hoyra meira. Shino bíðar eftir røttu løtuni at spyrja beinleiðis, um tær vilja trúgva. Biðið fyri hesum.

## *23. Fríggjadagur* *Róm. 10.1-21*



### FILIPSOYGGJAR
### Puerto Prinsessa
### Cathy og Jógvan J. Rasmussen

Molise landsluturin, her vit búgva í Italia, er hart raktur av Covid-19. Tølini á Filipsoyggjum eru heldur ikki góð, so vit sleppa ikki til tey ymisku plássini, eg skuldi til, fyrr enn komandi ár.

## *24. Leygardagur* *1. Krønb. 12.1-19*



### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Tíverri var politiskur ófriður her í Senegal í mars, og tí útsetti umsetingarráðgevin, sum skuldi koma úr USA, ferðina til Senegal. Vónandi kann hann koma í juni ístaðin. Ófriðurin vardi tíbetur ikki leingi, og vit vóna og biðja um støðugan frið. Tað gongur framá at gera kladduna til Lukasar evangeliið.

## *25. Flaggdagur* *1. Krønb. 12.20-40*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 12**

Vit eru takksom, at støðan her aftur er friðarlig. Biðið, at teir leiðandi finna eina varandi loysn á umstøðunum, ið elvdu til ófriðin. Markið millum Guinea og Senegal hevur verið stongt í meira enn eitt ár. Biðið, at skjótt verður latið uppaftur, og at vit kunnu kenna Guds frið, tá ið ófriður er kring okkum.

⋆ Í dag fyllir Markus Tuohy 9 ár

## *26. Mánadagur* *Róm. 11.1-21*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Vit eru í Kanada saman við familju og samkomuni. Eg endurskoði nú Ápostlasøguna og síðan Tessalonika- og Rómbrævið. Á Filipsoyggjum hava tvey fólk vent við til Harran. Fleiri ung biðja um hjálp at evangelisera. Til tað fáa 10 - 12 ungdómar vegleiðing annanhvønn leygardag.



**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *27. Týsdagur* *Róm. 11.22-36*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 17, Rebekka 16, Hanna 12**

Hin óndi blindar og bindur fólk. Tí royni eg sum skjótast at bera teimum evangeliið. Nú vegir verða bygdir, er eisini lættari hjá rangari gudsdyrkan at náa ættarfólk. Síðst tá eg lærdi ættarfólkið Kedulan, kom ein kultpastorur, sum lærdi tey, at Jesus bara var menniskja og ikki Gud. Hann órógvaði undirvísingina. Eg skuldi júst tá undirvísa um krossfesting Jesusar. Vit eru í andaligum bardaga.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Mikudagur* *Róm. 12.1-21*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13**

Vit hava arbeitt við einum lærisveinaátaki á netinum eina tíð. Biðið, at Harrin signar hesa tænastu.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Durita Olsen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

## *29. Hósdagur* *Orðt. 4.1-27*

### OM-FØROYAR

Vit eru farin í holt við at náa íslendsku grannum okkara. Biðið fyri verkinum, og setið tykkum í samband við okkum, um tit eisini hava hjarta fyri Íslandi.




### OM - LOGOS HOPE

Logos Hope liggur í Willemstad í Curaçao. Har verður hon liggjandi í fyrsta umfari til síðst í mai. Umborð eru Sámal Rasmussen, Noomi Eysturtún og Hannah Berghamar.

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!
**388 síður 220 kr.**




Í søguligu skaldsøguni um Føbe lýsir bretski høvundurin so livandi lívið í Róm og tátíðar heiminum, soleiðis sum hann sá út á døgum Paulusar. Føbe verður umtalað í Rómbrævinum, og høvundurin brúkar hana sum høvuðspersón at lýsa gerandisdagin í Róm hjá teimum fyrstu kristnu. Aftast í bókini er áhugavert søguligt tilfar um nógv ymisk viðurskifti. Paula Gooder er granskari í Nýggja Testamenti.

★ Í dag fyllir Rebekka Sharp 16 ár

Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos